# Norskur línubátur tikin



*Sunnudagin tók danska verjuskipið Trithon norska línubátin Keltic undir Føroyum. Mánamorgunin um ellivutíðina kom so Trithon á Havnina við norska línubátinum. Trithon tók Keltic sunnudagin, tí hann hevði ov nógva hjáveiðu.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Brimbrot elvdi til skaða

**Nógvur vindur og nakað av uppgangi var í Leirvík fríggjadagin. Beint sum Dúgvan legði at um tveytíðina seinnapartin, tóku tvey ella trý stór brot seg upp um grótkastið og stór vatnmongd skolaði tvørtur um parkeringsøkið**

UPPGANGUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Nógvur uppgangur í Leirvík gjørdi, at eini tvey ella trý brot tóku seg upp um grótkastið og elvdu til skaða á bilar. Somuleiðis komu nógv smágrót við brotinum*

Ilt var í sjónum í Leirvíksfirði fríggjadagin og somuleiðis heilt fitt av vindi. Tað breyt rættuliga nógv við grótkastið. So hart, at nøkur ógvuslig brot tóku seg uppum og elvdu til skaða á tveir bilar, sum stóðu parkeraðir í norðara enda á ferjuleguni.

Nógv smágrót, runa og onkur stór grót komu við brotinum, og tað sást serliga væl á aftur á kavanum, sum lá hvítur og reinur áðrenn brotið.

Brotið var so mikið ógvusligt, at tann eini bilurin varð fluttur inn í ein annan. Somuleiðis hevði nógv sjórok verið har fríggjadagin.

Frá løgregluni í Eysturoynni verður sagt, at sjógvurin slætnaði so við og við út á dagin. Landsverksfrøðingurin ruddaði meginpartin av grótinum og rununi burtur. Tey fingu tó ikki ruddað alt, tí bilar stóðu parkeraðir á økinum.

Fólk sum sótu í teirra bilum og bíðaðu eftir Dúgvuni siga, at talan var um eitt sera ógvusligt brot, og at tað var heppið, at ongin gekk framvið grótkastinum júst ta løtuna.




# Rentuhækkingin nærkast

Størsta hendingin í farnu viku var, at amerikanski tjóðbankin (FED) broytti orðingina viðvíkjandi rentuhugsjón teirra. FED gevur nú ábendingar um, at ein møgulig rentuhækking nærkast. Hóast ein slík kortini ikki skal væntast teir fyrstu mánaðirnar, styrknaði dollarin munandi og rentur hækkaðu sum heild. Orðini frá FED fingu samstundis partabrøv at lækka, og farna vikan var tann fyrsta síðani novembur at amerikonsk partabrøv (S&P 500) lækkaðu.

Hóast kunngjørt varð farna fríggjadag, at búskapurin í USA einans vakst 4% í 4. ársfjórðingin móti væntaðum 5%, fingu hesi tøl avmarkaða ávirkan á renturnar. Um grópað verður í tølum sæst kortini, at kunngerðin var hampulig. Aðrar búskaparligar uppgerðir úr USA vóru eisini bjartskygdar, so ein eigur ikki at óttast um vakstrarmøguleikarnar í USA; sum nú er.

Komandi vikuskifti hava G7 londini fund í Boca Raton í USA. Eitt av høvuðsevnunum til umrøðu verður gjaldoyraintrivini, tey asiatisku londini fremja í síni roynd, at styrkja um sítt kappingarføri. Væntandi fara G7 londini aftur at minna asiatisku londini á týdningin, at hava liðilig gjaldoyru, sum verða stýrd av teimum grundleggjandi búskaparviðurskiftunum. Undan G7 fundinum, kann tí væntast, at dollarin verður óstøðugur mótvegis evruni og donsku krónuni.

Áhugaverdasta hendingin hesa vikuna verður fríggjadagin, tá mánaðarliga amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin verður kunngjørd. Hendan varð eitt vónbrot seinasta mánað, og tí er sera avgerandi fyri marknaðirnar, at hendan gerst bjørt hesaferð. Væntað verður, at 160.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í januar. Verður talið lægri, kunnu vit vænta munandi rentuhækkingar og fallandi partabrøv. Verður talið sum væntað ella hægri, verður úrslitið hækkandi rentur og partabrøv.

Í farnu viku komu bjartskygdir rokniskapir frá Hennes & Mauritz og Novozymes, meðan rokniskapurin hjá Sony gjørdist eitt vónbrot. Hesa vikuna kunngerða m.a. Novo Nordisk, Volvo, Deutsche Bank, Danske Bank og Ericsson roknskap. Partabrævamarknaðirnir liggja á lægri stigi enn fyri viku síðani. Góðir roknskapir kunnu tí føra við sær hækkandi partabrøv og rentur, men sera hugsandi fara marknaðirnir at verða í bíðistøðu til arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin verður kunngjørd fríggjadagin.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,65% | 0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,51% | 0,08% |
| 10 ára lánsbræv | 4,40% | 0,07% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 264,0 | -0,3% |
| OMX, Svøríki | 679,0 | 0,3% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.706,9 | -0,7% |
| S&P 500, USA | 1.131,1 | -2,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 108,10 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 164,49 | -0,5% |
| Norrøn Partabrøv | 75,90 | -1,2% |
| Altjóða Vøkstur | 63,25 | 0,0% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 597,87 | 0,0% |
| EUR | 745,03 | 0,0% |
| GBP | 1.087,51 | 0,2% |
| NOK | 85,29 | -1,5% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*

Vika 6, 2004
www.kaupthing.fo




# Nýggjur bátur til Vágs

**Leygarkvøldið kom nýtt far inn á Vágsfjørð. Talan er um bát, sum kemur inn fyri gomlu Nesborg, sum sostatt skal úr flotanum og er hon tí til sølu. Nýggi báturin er keyptur úr Noreg og er bygdur í 1990**

FISKIFØR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Nýggja farið hjá vágbingum, ið fær navnið Nesborg. Í baksýni sæst gamla Nesborg, sum nýggja farið kemur inn í flotan fyri*

*(Mynd; D. Olsen)*

Leygarkvøldið kom eitt nýtt fiskifar á Vág og nógv fólk vitjaðu umborð at fregnast og fegnast. Enn ber farið navnið Brodd, men brátt kemur at standa Nesborg ístaðin. Tað eru nevniliga menninir handan felagið Tvøran, sum m.a. eigur Nesborg, sum nú skifta gomlu Nesborg út við nýggja farið, sum sostatt nýtir fiskiloyvið hjá Nesborg.

Tann 29/01-04 klokkan 11 yvirtóku umboð frá Tvøruni bátin í Ålesund og Merkið varð vundið á stong.

Talan er um far, sum er bygt til Íslands í 1990, men í 1995 fór báturin til Noregs, varð longdur, og fekk navnið Brodd. Men nú báturin kemur til Vágs, verður navnið Nesborg. Báturin er 34 metrar til longdar og 7,90 metrar breiður. 7 mans verða við, tá Nesborg fer til fiskiskap - væntandi um einar 14 dagar.

Stórur munur er á gomlu Nesborg og nýggja farinum. Gamla Nesborg er gamalt skip, skrokkurin er 43 ár og er Nesborg umbygd til trolara, ella tað ið minnir um, so partar eru nakað yngri, tó yvir 20 ár. Nýggja farið er bygt trolari og munurin er m.a. at eitt dekk er afturat, so menn standa inni.

Enn frættist lítið um endaliga prísin, tí enn er ikki endaliga uppgjørt. Men hýrurin er góður á monnum og skemtiliga verður tikið til, at prísurin svarar til tað, ið upsaprísurin er í Føroyum í dag! Óváttað tíðindi vilja tó verða við, at keypsprísurin er millum 3 og 4 milliónir krónur. Tað skilst, at menn hava góðar vónir við nýggja farinum.

# Portalurin í nýggjum hami

**Mest vitjaða heimasíða innan tíðindaflutning í Føroyum nú í nýggjum búna**

HEIMASÍÐA
*Tíðindaskriv*

Heimasíðan »www.portal.fo« er mest vitjaða heimasíða innan tíðindaflutning í Føroyum og helst eisini mest vitjaða heimasíða yvirhøvur í Føroyum.

Í gjár, mánadagin 2. februar 2004, vórðu nýggju heimasíðurnar hjá Føroya Tele almannakungjørdar, talan er um hesar heimasíðurnar:

Portal.fo
Sportal.fo
Pop.fo

Føroya Tele hevur í samstarvi við Farodane broytt sniðið á hesum heimasíðum. Eisini eru gjørdar avtalur við m.a. Vinnuhúsið um vinnutíðindi, Føroya Ferðaráð um komandi tiltøk at fara til í frítíðini og Norðurlandahúsið um mentanartíðindi.

Heimasíðurnar eru upplagdar á nýggjar Linux-ambætarar og eru nú forritað í PHP-forritsmáli, og førur hetta við sær, at síðurnar vera skjótari at heinta fram á telduskíggjanum.

Tíðindablaðið Sosialurin fer framhaldandi at skriva øll beinleiðis tíðindini, og sum nakað nýtt, eru allar tríggjar heimasíðurnar tengdar saman á eini og somu framsíðu, sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi.



# »Lægens Bord« fekk medisin á Grønabóli

**Hetta er rættur heilivágur fyri sál og sinn helt sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling, tá ið hann sá málningarnar hjá Archibald Black**

*Mynd & tekstur:*
*Dávur Winther*

Peter Qvortrup Geisling tók sær stundir til at síggja Klaksvíkar Sjúkrahús, Røktarheimið og eisini málningavavið hjá Archibald Black sunnudagin. Peter vísti skjótt í prátinum við Archa, at hann kendi hópin av list og listarmonnum. Tónin var lagdur og prátið gekk so listiliga millum hesar báðar róligu og fyrikomandi menninir.

»Tá ið tú gert so nógvar málningar og tað sjónliga sæst, at tú kannst so nógvar ymiskar leistagreinar, so má tað vera gott fyri sinnalagið«; helt læknin fyri. »Tú fært lagt hópin av tonkum uppá pláss, samstundis sum tú fært roynt hugflogið - Hetta er reinur heilivágur«, segði sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling.

Peter var sera hugtikin av, at Archibald dugdi sítt tekni- og málarakynstur so meistarliga væl og samanbar hann við alheims kend nøvn, so sum Trampedach.

Peter, sum umframt at vera kunstkennari og -samlari, samlar eisini frímerkir og skjeyt upp, at partur av málningunum áttu at verið motivir til føroysk frímerkir, tí góðskuni feilaði einki.

Hóast Tala Black bjóðaði kaffi og køkur, tí hon henda dagin hevði føðingardag, so var torført at hála læknan burtur frá málningunum, sum hann var so hugtikin av. Hann var eisini bergtikin av útsýninum á Grønabóli og tí hóttandi Myrkjanoyrafjalli omanfyri, ið Archibald skoðaði hvønn dag og heintaði sær hópin av íblástur úr.

»En stærk sjæl i et sundt legeme«, var niðurstøðan hjá Peter Qvortrup Geisling sjónvarpslæknanum, sum hevði notið gott at góðu listverkunum hjá Archibald Black á Grønabóli.

